# Kanning um Norrønu

**Skeivar upplýsingar, gitingar, óvissa, vánaligt kanningararbeiði og bíløgd orðing eru millum lemjandi skotini, sum skipsførarin Ørvur Thomassen gevur kanningini hjá Skipaeftirlitinum av óhappinum hjá Norrønu í Havn í fjør. Skipara- og Navigatørfelagið hevur kært niðurstøðurnar hjá Skipaeftirlitinum og vil hava Fiskimálaráðið at taka tær aftur. Kanningin hjá Skipaeftirlitinum hevði við sær, at skiparin á Norrønu var koyrdur í land**

KANNING

*Eyðun Klakstein*
*eydun@sosialurin.fo*

Skipsførarin Ørvur Thomassen fer í einari nýggjari frágreiðing harðliga við frágreiðingini hjá Skipaeftirlitinum um óhappið hjá Norrønu í Havn í fjør.

Niðurstøðurnar í frágreiðingini kunnu ikki brúkast, tí tær byggja á skeivleikar, gitingar, misvísandi upplýsingar og vantandi dugnaskap við at skaffa sær neyðugar upplýsingar umborð á Norrønu, heldur Ørvur Thomassen.

Hann hevur drúgvar royndir sum skipari á líknandi skipum sum Norrønu, og hann hevur kannað niðurstøðurnar í frágreiðingini hjá Skipaeftirlitinum.

Skipara- og Navigatørfelagið, sum hevur biðið um frágreiðingina frá Ørvi Thomassen, krevur nú í eini kæru til Fiskimálaráðið, at niðurstøðurnar í frágreiðingini hjá Skipaeftirlitinum verða tiknar aftur. Um tað verður gjørt, má Smyril Line finna aðrar og nýggjar grundgevingar fyri at siga skiparan úr starvi.

Ørvur Thomassen vísir á, at skeivar upplýsingar um vindferð, ferð á skipinum, gitingar av ymsum slagi, óvissa um simulatorroyndir og vantandi data frá skipanum á brúnna gera, at niðurstøðurnar í frágreiðingin hjá Skipaeftirlitinum kunnu ikki takast fyri fult.

Harafturat leggur hann Skipaeftirlitið undir at hava bílagt eina orðing um skeiva manøvru frá felagnum Force.

## Skiparin misti starvið

Tað var tann 15. januar í fjør, at Norrøna kom illa fyri, tá ið hon skuldi leggja at í Havn. Nógvur vindur var, og skipið bar við land. Á veg út úr Havnini brast skipið í endan á molanum og stórt hol kom á síðuna á skipinum. Løtu seinni eydnaðist tað at koma inn aftur og fáa lagt skipið at.

Síðani hevur nógv verið tosað um hesa hending, og Skipaeftirlitið stóð fyri einari kanning av tilburðinum, sum síðani hevði við sær, at skiparin á túrinum, Ólavur Hovsgarð, var koyrdur í land og fekk annað starv hjá Smyril Line.

Men nú verður stórt spurnartekin sett við niðurstøðurnar í frágreiðingini, sum kostaðu skiparanum starvið umborð á Norrønu.

## Óvissa um simulatorroyndir

Skipaeftirlitið hevur í sínari frágreiðing brúkt simula-






*Einki av ferðafólkunum fekk mein av tilburðinum, men tey fingu sálarliga kreppuhjálp í boði, tá ið tey komu í land*



*Nógvi og óvæntaði vindurin var orsøkin til, at Norrøna fekk trupulleikar í Havn á nógv umrødda túrinum í januar mánaði í fjør*